SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Mær tørvar ikki verja. Eg eri ósekur og fari at prógva tað. Við Guðs hjálp verði eg fríkendur*

*(Radovan Karadzic)*

# Karadzic útflýggjaður og komin til Haag



*Við hesum flogfarinum kom Radovan Karadzic til Haag (Mynd: Polfoto)*

**Fyrrverandi bosniaserbiski leiðarin Radovan Karadzic kom í morgun til Haag, har hann skal fyri altjóða krígsbrotsmannadómstólin**

Tað var týðiligt, at okkurt serligt var á vási á flogvøllinum í Rotterdam tíðliga í morgun. Tyrlur hjá niðurlendsku løgregluni flugu uppi yvir vøllinum og økinum kring vøllin, og fleiri løgreglubilar stóðu og bíðaðu.

Løtu seinni lendi eitt lítið flogfar. Teksturin á tí vísti, at talan var um eitt serbiskt flogfar, og so var greitt, at flogfarið var komið við fyrrverandi bosniaserbiska leiðaranum Radovan Karadzic.

Niðurlendskir løgreglu- og trygdarmenn fylgdu Karadzic úr flogfarinum inn í ein skottryggan bil, sum flutti hann týdningarmikla gestin til eitt fongsul í Schveningen beint uttan fyri Haag. Har skuldi hann fyrst til læknakanningar, og er heilsan í lagi, skal hann bíða har einar tveir dagar, áðrenn hann skal fyri krígsbrotsmannadómstólin fyrstu ferð.

Krígsbrotsmannadómstólurin hevur skuldsett Radovan Karadzic fyri grov krígsbrotsverk undir borgarakrígnum í Bosnia í 1990-árunum. Talan er um skuldsetingar fyri bæði fólkadráp, etniska útreinskan og annan ágang.

### Kann taka ár

Millum annað er Karadzic skuldsettur fyri at hava havt ábyrgdina av, at 12.000 fólk doyðu í Sarajevo, meðan býurin var hersettur, og hann er eisini skuldsettur fyri at hava havt ábyrgdina av, at 8.000 muslimskir menn og dreingir vórðu myrdir í býnum Screbrenica í 1995.

Ákærin hjá krígsbrotsmannadómstólinum hevur reist 11 ákærur ímóti Karadzic, og innan 30 dagar skal hann gera sínar viðmerkingar til tær og siga frá, um hann játtar seg sekan ella ikki.

Tað er longu greitt, at Karadzic fer at vísa ákærunum aftur, og serfrøðingar í Haag siga, at rættarmálið ímóti honum byrjar neyvan fyrr enn um nakrar mánaðir, og at tað kann taka ár, áðrenn dómur fellur. Karadzic hevur boðað frá, at hann ætlar at verja seg sjálvan, eins og Slobodan Milosevic gjørdi.

Tað eru 11 ár, síðani krígsbrotsmannadómstólurin bað serbisku myndugleikarnar taka Radovan Karadzic og Ratko Mladic. Tann seinni er ikki tikin enn.



*Klivin, sum Radovan Karadzic skal halda til í, er 15 fermetrar við einari song, einum mborði, einum sjónvarpi og brúsu (Mynd: Polfoto)*

**STUTT SAGT**

## Biðja Brown fara

Trýstið á bretska forsætisráðharran, Gordon Brown, veksur í hvørjum, og nú vilja eisini summir av hansara egnu floksfeløgum hava hann at fara frá. Teirra millum er parlamentslimurin Gordon Prentice. Við blaðið Financial Times sigur hann, at Gordon Brown má duga at skilja, at tað er best fyri hann sjálvan og stjórnarflokkin, at hann leggur frá sær. Financial Times skrivar, at fleiri aðrir Labourtinglimir siga tað sama sum Gordon Prentice, men ikki alment. Sjálvur hevur Brown gjørt greitt, at hann fer ikki frá.



*Gordon Brown undir trýsti (Mynd: Polfoto)*

## Aftur ein Pinochet

Eftirnavnið Pinochet hvørvur ikki úr kilskum politikki við fyrrverandi forsetanum Augusto Pinochet, tí nú ætlar elsta dóttir hansara, Lucia Pinochet Hiriarte, sær upp í politikk. Hon hevur júst stillað upp til kommunuval í býarpartinum Vitacura í høvuðsstaðnum Santiago. Hetta er ein av teimum býarpørtunum, har yvirhøvur múgvandi fólk búgva, og har nógvir av teimum dýraru handlunum hava sínar deildir. Lucia Pinochet bleiv tikin í fjør saman við øllum hinum í Pinochet-ættini í sambandi við ákærurnar ímóti pápa hennara. Hon varð tók latin leys tveir dagar seinni.



*Lucia Pinochet Hiriarte (Mynd: AP)*